SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Fylgiskjal 5

Sjóvinnustýrið, 21. mars 2025

Viðmerkingar til áheitan frá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip um tillagingar tonsaskattalógini

Sjóvinnustýrið heldur fast í grundgevingini fyri lógarbroytingini í 2020, har ásett varð, at time charter skip fevnd av afturberingarskipanini, skulu vera skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS). Orsøkin var at tryggja, at útlendsk reiðarí ikki kundu gagnnýta afturberingarskipanina uttan at vera skrásett í FAS.

Ein treyt fyri at verða skrásett í FAS og fáa afturbering er, at skipið skal vera yngri enn 20 ár, og at skipið er omanfyri 100 BT.

Um tíðarskeiðið fyri time-charter verður longt til 5 ár, sum uppskot 2 í skrivinum hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip leggur upp til, nýtast hesar treytir ikki at verða loknar. Tað hevði givið skipum og reiðaríum fríari atgongd til FAS við lagaligari treytum. Hetta kann hava við sær, at reiðarí velja at skráseta skip undir øðrum flaggi fyri at sleppa undan upptøkukrøvunum í FAS. Slík skipan hevði verið kappingaravlagandi og ímóti endamálinum við FAS.

Sjóvinnustýrið mælir tí frá at taka undir við uppskoti 2 í skrivinum hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip.

Vinarliga,

Sjóvinnustýrið